einfaldari
- ger tað einfaldari
Januar 2012

# Gott nýggjár



Eitt av tí, sum Francis av Assisi legði eftir seg í samkomu- og kirkjusøguni, var hansara halgan at tæna øðrum. Mátti bøn hansara hjálpt okkum at tæna hvør øðrum í 2012.

JZ

*Harri, ger meg til eitt amboð í Tíni hond.
Lat meg sáa kærleika, har hatur er,
Fyrigeving, har órættur verður framdur,
Semju, har klandur valdar,
Sannleika, har lygnin er í hásæti,
Trúgv, har ivin gnagar,
Vón, har vónloysisandin ræður,
Ljós, har myrkursins andar ræna,
Og gleði, har sorgin nívir.*

*Á, heilagi Meistari.
Lær meg ikki bert at leita eftir troyst
frá øðrum, men sjálvur at troysta.
Lær meg at hoyra onnur heldur enn
sjálvur at verða hoyrdur.
Lær meg at elska uttan sjálvur at
krevja at verða elskaður aftur.
Lær meg at geva uttan at vænta
nakað afturfyri.*

*Francis av Assisi*

## Bøn tað størsta

“At biðja er uttan iva tað størsta, eitt menniskja kann gera. Eitt menniskja er við sítt størsta og hægsta, tá tað á knøunum møtir Harranum andlit til andlit.”

*(Sitat frá sunnudegnum 1. januar eftir Martyn Lloyd-Jones)*

*Martyn Lloyd-Jones (1899-1981) walisiskur protestantiskur prestur, prædikumaður og lækni*



# HENDINGAR & TILTØK

## Eigil Gunnarsson



Sunnudagin 18. desember 2011 andaðist Eigil Gunnarsson á Landssjúkrahúsinum, 91 ára gamal.

Eigil var føddur og vaks upp í Vági. Í 1940 flutti hann til Havnar, har hýruvognskoyring bleiv hansara lívsstarv. Hann var ein av stovnarunum av bilstøðini Taxa í 1952, sum í 1955 skifti navn til Auto. Hann koyrdi í Auto, til hann var 76 ára gamal í 1996, við undantak av árunum frá 1970-78, tá hann rak bensin- og oljusøluna á støðini.

Eigil giftist í 1951 við Jenny, f. Mikkelsen, av Toftum. Tey fingu tríggjar synir: Magnus, Gunnar og Regin umframt átta barnabørn. Miðskeiðis í 90-unum gjørdist Jenny sjúk og andaðist í 1999, 74 ára gomul.

Hóast Eigil náddi høgan aldur, dámdi honum væl at koma út millum fólk. Hann koyrdi bil til fáar dagar, áðrenn hann andaðist, eins og hann kom til ymisk tiltøk og til møtir í Ebenezer og í Lívdini. Honum dámdi eisini væl at ganga túrar, serliga á Skálatrøð og í Vágsbotni.

Vit minnast Eigil við takksemi.

## Torbjørg Marita Jøkladal



Fríggjadagin 30. desember 2011 andaðist Torbjørg Marita Jøkladal á Landssjúkra-húsinum, 78 ára gomul.

Torbjørg var ættað úr Klaksvík. Eftir at hon og Bjarni Jøkladal, sum er ættaður úr Fuglafirði, giftust í 1952, búðu tey fyrstu árini í Klaksvík.

Í 1968 fluttu tey til Kollafjarðardal, har tey róku Essostøðina í Dalinum. Í 2002 fluttu tey til Hoyvíkar og hava síðani verið knýtt at Lívdini.

Torbjørg var ógvuliga virkin og kreativ og hevur bundið nógv upp á børnini, umframt at hon var við á framsýningum.

Børnini hjá Torbjørg og Bjarna eru Ólavur og Bjarti umframt barnabørn og langommu- og langabbabørn.

Vit minnast Torbjørg við takksemi.



## Kalendarin hjá NTM

Kalendarin hjá New Tribes Mission fyri 2012 er at fáa á kunningarborðinum í Lívdini. Fyri hvønn mánað er ein mynd ymsastaðni frá í heiminum, har sum felagsskapurin arbeiðir.

## Til lukku við barninum



29. desember 2011 fingu Barbara og Noé Chaparro dóttrina Naomi Melody. Hon var 49 cm long og vigaði 2.625 gr.

1. desember 2011 fingu Rósa og John Syderbø í Hoyvík eina dóttur. Hon vigaði 4000 gr og var 55 cm long.

## Spælistovan byrjar aftur



Mikudagin 11. januar 2012 kl. 10 verður spælistovan aftur í Lonini. Spælistovan er fyri øll børn í aldrinum 0-6 ár saman við mammu og/ella pápa.

## Opið hús í Lonini

Hósdagar frá kl. 16.00 til 18.30 er opið hús í Lonini. Ætlanin er, at opið hús skal vera í Lonini hvønn hósdag í vetur, har øll eru vælkomin inn á gólvið til drekkamunn og góða samveru.

## Samtalur og forbøn

Fólk frá Glóðini eru tøk aftan á seinna møtið sunnudagar at samtala ella at gera avtalu um samtalu. Glóðin er ein tænasta í Lívdini, sum er ein útrættur armur til menniskju, sum hava eitthvørt at stríðast við sum t.d. tunglyndi, ótta, sorg, vreiði, hjúnabandsviðurskifti ella tvístøður.

Eisini ber til at venda tær til Glóðina á tlf. 280011. Fólkini í Glóðini hava tagnarskyldu.

## Bønarmøtir

Týskvøld kl. 20.30 er bønarmøti í Lonini oman Hoydalar 28. Vit heita á samkomuna um at halga týskvøldið til bøn. Triðja hvørt týskvøld eru kyknubólkar.

*Skráin fyri týskvøldini januar 2012*

| | |
|---|---|
| Týskvøldið 10 . januar | Kyknubólkar |
| Týskvøldið 17 . januar | Bønarmøti |
| Týskvøldið 24 . januar | Bønarmøti |
| Týskvøldið 31. januar | Kyknubólkar |



# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

**Sunnudagin 1. januar**
Nýggjársmøti kl. 12.00


Halla

**Sunnudagin 8. januar**

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | Halla Áargarð sigur frá |
| Hoyvíksmøti kl. 12.00: | Evni: Hvat gera vit kvinnur nú?<br>Talari: Beinta Áargarð |


Beinta

**Sunnudagin 15. januar**
Familjumøti kl. 10.30

| | |
|---|---|
| Hoyvíksmøti kl. 12.00: | Evni: Andlit trúarinnar<br>Talari: Poul Guttesen |


Poul

**Sunnudagin 22. januar**

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | Evni: Himmalin (1/2)<br>Hanna Andreasen sigur frá |
| Hoyvíksmøti kl. 12.00: | Evni: Hví kristindómur fram um alt annað<br>Talari: Jens Wang |


Hanna

**Sunnudagin 29. januar**

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | Evni: Himmalin (2/2)<br>Hanna Andreasen sigur frá |
| Hoyvíksmøti kl. 12.00: | Evni: Gev okkum Barabbas<br>Talari: Jógvan Zachariassen<br>(møtið verður upptikið til ÚF) |


Jens

**Ungdómstiltøk:**
Alive: leygarkvøld kl. 21.00

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*


Jógvan

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*